


## Fyrilestur um kappingarsamleika Føroya

Hóskvøldið 14. mai skipar Uttanríkisráðið fyri almennum fyrilestri í Miðlahúsinum um kappingarsamleika Føroya. Kendi bretski serfrøðingurin á økinum, Simon Anholt, heldur fyrilesturin. Uttanríkisráðið varðar av verkætlanini um kappingarsamleika Føroya við ráðgeving frá Simon Anholt. Simon Anholt ráðgevur eitt nú bretsku, amerikonsku og finsku stjórnini og hevur ráðgivið Svøríki, Ný Sælandi og Týsklandi. Hann uppfann hugtakið tjóðarbranding«, ið hann seinni umdoypti til »kappingarsamleika«. Fyrilesturin snýr seg um, hvussu vit kunnu fáa onnur lond at hava eina greiða, sterka og jaliga fatan av Føroyum, og hví vit skulu gera hetta. Fyrilesturin er ókeypis, á enskum og verður í Miðlahúsinum hóskvøldið 14. mai kl. 19.30.

# Barbara tók fyrst Berlin síðan Havnina

**Komandi vikuskifti verður høvi at síggja og frætta um mótasýningina hjá Barbaru í Gongini í Müllerspakkhúsi**

MÓTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Danish Fashion Institut og Danish Design Center hava kosið Barbaru í Gongini sum ein av fýra í »NEW GENERATION BRAND«. Tískil er hennara merki boðið við til ta ambitiøsu verkætlanina »Bright Green Fashion«. Tað er ein workchoop, sum skal viðgera og sniðgeva soleiðis, at bæði tilevnani og produkt kunnu kalla seg umhvørvisvinarlig.

Endamálið við verkætlanini er at savna teir fremstu sniðgevararnar í Danmark saman við teim fremstu úr Berlin til at kjakast og arbeiða seg fram til realistiskar loysnir innan »Sustainabel Fashion« - burðardygga mótavøra.

Tað sum er serstakt við hesi verkatlan er, at her er lyklorið Móti og síðan burdardygni. Endarmálið er at gera burðardyggan móta eggjandi og miðjað verður móti at viðgera øll lið, frá vali av tilfari, flutningi, bjálving o. m. a, og hettar skal vera ein sjálvfylgja í øllum feløgum í framtíðini.

Í tríggjar dagar varð arbeitt og kjakast fyri at finna fram til loysnir, og reglur vórðu settar fyri, hvussu arbeiðast skal fyri at náa málinum um umhvørvisvinarligan atburð. Eisini bleiv hugt at altjóða reglum og problematikki viðvíkjandi recycling v.m.

Feløgini binda seg til heilt ella lutvís at gera umhvørvisvinarligar búnar, og trý sett verða útvunnin og sett í framleiðslu sambært hesum nýggju reglum og skulu somuleiðis vera partur av summarkollektiónini sum skal seljast á summri 2010. Hvør sniðgevi fær í mesta lagi 10 búnar við á framsýning, soleiðis at høvi verður at vísa ein størri breidd.

Felagið hjá Barbaru í Gongini hevur frá byrjan havt eina holistiska áskoðan á hesum øki, og hevur sostætt longu royndir, og stórur partur er gjørt umhvørvisvinarliga.

Verkatlanin verður víst á Ráðhúsinum í Keypmannahavn 28. august í samband við DESIGNUGEN og eisini á altjóða veðurlagsrádstevna sum verður hildin í Keypmannahavn seinni í ár.

Barbara í Gongini kemur heim at kunna um sítt merki og verður sostatt eisini høvi at síggja mótasýningina, sum varð sýnd á mótavikuni august 08, sum fekk so góða umrøðu.

Eisini verður høvi at ogna sær pløgg frá summarkollektiónin 09.

Barbara í Gongini verður at hitta í Múllers Pakhúsi 15. og 16. mai



**Partur av summarkollektiónini 09 hjá Barbaru í Gongini, sum høvi verður at síggja í Müllers Pakkhúsi næsta vikuskifti**

# SANSA í Runavík 19. mai



*Anna Nygaard, sum vann kappingina Ársins Songrødd fyri nøkrum árum síðani, fer at syngja við tiltakið*

**Handilsmiðdepilin í Runavík skipar fyri stórum spennandi tiltaki í nýggja Mentanarhúsinum í Runavík týskvøldið 19. mai. Tiltakið kallast SANSA, og er hetta eitt væl krydrað kvøld, har limir í HMD bjóða teirra vørur og tænastur fram á ein kreativan hátt. Harumframt verður skemt og tónleikur eisini ein partur av kvøldinum, sum byrjar klokkan 19.00 og endar klokkan 23.00**

TÍÐINDASKRIV

Á skránni er nógv forvitnisligt og spennandi. Eitt nú hava luttakandi limirnir í Handilsmiðdeplinum vøruframsýning og sølu, umframt at mótahandlar hava mótasýning. Mótasýningin verður í tveimum, har børnini eru í tí fyrsta partinum. Vitjandi fáa bæði høvi at síggja vørubásarnar í steðginum og aftur seinni á kvøldinum.

Anna Nygaard av Glyvum fer at undirhalda við sangi. Anna er væl kend í tónleikaumhvørvinum. Hon varð ársins songrødd fyri nøkrum árum síðan, og eftir hetta hevur hon verið at hoyrt javnan við síni framúrskarandi rødd.

Ein fyrilestur verður eisini at hoyra, Sissal Kristiansen fer at hugleiða um tín persónliga samleika. Her hugleiðir hon millum annað um, hvat klæðini og litirnir tú brúkar siga um teg sum persón.

Tveir persónar, ein maður og ein kvinna, verða broytt. Til hetta hava vit stylist at hjálpa okkum. Broyttu persónarnir verða avdúkaðir síðst á kvøldinum

Spennandi ábit verður. Her er tað Oddvør Skarðhamar sum borðreiðir við italienskum brellbitum. Tað merkir at tú fært ein smakk at fleiri rættum, við einum íblástri úr Italia.

Jákup Veyhe og Kim Hansen hava skemt. Her verður sjálvandi eitt sindur av tónleiki, og kenna vit Jákup rætt, so plagar hann at verða undirhaldandi.

Atgongumerki á 200 kr. vera at fáa í Statoil Saltangará og limahandlum. Sí www.hmd.fo.

**Luttakandi limir verða:**

Berglon, Bakaríið, Bókabúðin, Borg, Colorama, EIK, Elding, FK Saltangará, Føroya Tele, Hjá Sannu, Ítróttur á Glyvrum, Jungmann, Opus, Orkis, Shopin, Thomas Dam Búnýti, Trendfloor, Vodafone, Vøruhúsið